## Sámal í Snarskivuni

Í morgin letur Sámal Toftanes upp myndlistaframsýning í Snarskivuni hjá Tórshavnar kommunu. Sámal Toftanes er úr Leirvík og hevur altíð málað. - Eg máli náttúru og fólkalív, og hvussu ljósið brýtur fram og skapar dagin. Til dømis av Blankaskála, og so eisini menn, ið eru á fjalli. Ofta verður tað ljósið, ið miðsavnar myndaevnið, sigur listamaðurin á heimasíðuni hjá Tórshavnar Kommunu. - Eg máli sjáldan til framsýningar, so hetta er spennandi, sæð í mun til at mála uppá bestilling, sigur hann. .Høvið verður at síggja teir áleið 15 málningarnar hjá Sámali Toftanes til og við 1. desember 2008. Sagt verður, at øll eru vælkomin til ein drekkamunn, tá framsýningin hjá Sámali Toftanes letur upp hósdagin klokkan 16, eins og at njóta myndlistina, tá Snarskivan er opin.



# m uttan Norrønu




*Grundgevingarnar hjá politikarunum fyri at lata Norrønu almennan stuðul, eru púra meiningsleysar, staðfestir Joel undir Leitinum, stjóri í Samskipum*

ónir, síggja ikki soleiðis út. Tey eru minst 200 metrar long, taka 4000 bingjur og sigla upp á fjareystur. Norrøna er ikki farmaskip, hon er ferðamannaskip, so at dyrgja eftir, at farmaflutningur skal bjarga einum so dýrum skipi, sum Norrønu, er púra burturvið.

- Tað er púra meiningsleyst, at landið skal spýta 30 milliónir í Norrønu fyri at bjarga farmaflutning-inum.

Norrøna kann gevast í morgin um so skuldi verið, tí farmaflutningurin hevði kortini verið í tryggum hondum hjá teimum flutningsfeløgum, sum eru eftir.

- Og hvat ferðafólki viðvíkur, er tað uttan iva onkur, sum stendur til reiðar at lyfta tað uppgávuna við einum skipi, sum loysir, skuldi tað hent, at Norrøna gevst, tí tað er náttúran í frælslyntum vinnulívi.

- Annars hava vit Atlantsflog eftir, so støðan hevði ikki verið heilt vanlukkulig, um onki skip var eitt tíðarskeið.

- Kanska hevði tað ikki verið við einum nýggjum skipi, men tað er lutfalsliga bíligt at leiga skip nú á døgum og prísirnir fella alsamt, leggur hann afturat.

- At politikarar finna upp á slíkt, vísir bara, hvussu lítið innlit teir hava í veruligu støðuna, leggur hon afturat.

Hann heldur, at politikararnir kundu í minsta lagi forhoyrt seg hjá øðrum í vinnuni um støðuna, men hann staðfestir, at ongin hevur tosað við Samskip.

### Avlagar bæði kapping og prís

Joel undir leitinum staðfestir, at fær Norrøna almennan stuðul, fer tað sjálvandi at gera sjálvandi at gera støðuna hjá hinum flutningsfeløgunum, sum klára seg upp á vanligar marknaðartreytir, nógv torførari enn hon er frammanundan.

- Vit onnur verða noydd til at laga prísir, kostnað og skip til tann marknaðin sum er.

Men tá ið Norrøna kemur í neyð, fer Smyril Line bara í landskassan eftir pengunum.

-Tað er meiningsleyst, sigur Joel undir Leitinum.

Veruleikin er, at við hesi fíggjarligi innspræningini, hjálpa politikararnir Smyril Line til at dumpa prísirnir á marknaðinum

- Veruleikin er, at sum vit onnur, hevur Smyril Line ikki verðið noydd til laga sínar prísir eftir tí kostnaðarstøðið, teir høvdu, tí teir eru slopnir í landskassan, tá ið teir eru komnir í trupulleikar, men tann møguleika hava vit ikki.

## Samgongan bjóðar í studningsveitslu

- Byrja politikararnir nú aftur at lata privatum fyritøkum almennan stuðul, hava teir latið ein ventil upp.

Tað staðfestir Joel undir Leitinum, stjóri í Samskipum.

Hann staðfestir, at tað er nógv vinnulív, sum flýtur tungt í sjónum, bæði fiskiskip, fiskvavirki og aðrar fyritøkur.

Og hann heldur, at fara politikararnir nú at pilka eina einstaka fyritøku burtur úr og lata henni almennan stuðul, er tað skrivlig innbjóðing til allar kreppuraktar fyritøkur um at banka upp á í landsstýrinum at biðja um stuðul.

Hann sigur, at nú hava politikararnir sett gongd á studningsmylluna aftur.

Men hvar nær skal myllan steðga, spyr hann.

- Politikararnir boygnaðir. Teir eru farnir á glið og tað kann verða ómetaliga tórført at steðga aftur.

Veruleikin er, at tað, sum ikki kann standa, tað má falla, tí tað er aðaltátturin í einum frælslyntum samfelagið, sigur Joel undir Leitinum.

Hann heldur, at landsstýrið kundi brúkt hasar 30 milliónirnar betri, eitt nú í Suðuroy, sum liggur í andaleypi.

Hann sigur, at veruleikin hevur víst seg at vera, at Smyril Line royndi at gloypa ov stórum bita, táið tey bygdu nýggju Norrønu.

- Men sum skattgjaldari brýggi eg meg yvirhøvur ikki um at bløða fyri tað, sigur stjórin í Samskipum.

# gir íleggjarar



*- Nú politikarar ætla at bjarga Smyril Line, fer at gera tað ótryggari at gera íløgur í føroyskt vinnulív og tað fer at fáa íleggjarar at aftra seg við at gera íløgur her, staðfestir Jóhanna á Bergi, stjóri í Smyril Line*

oyskum og útlendskum íleggjarum.

- Men tá ið tað almenna kann finna upp á at pilka einstakar fyritøkur burtur úr og stuðla teimum, tá ið tað gongst illa, fer tað verða tórført at fáa íleggjarar at gera íløgur í Føroyum.

- Eg dugi ikki at síggja annað, enn at tað fer at ræða íleggjarar, tí hvør fer at gera íløgur í eina vinnugrein, tá ið teir kunnu enda í teirri støðu, at kemur ein kappingarneyti í óføri, so kann hann bara fara í landskassan eftir hjálp.

- Tað ger íløguna ótryggari og tí er hetta eitt ómetaliga óheppið signal, sum politiski myndugleikin sendir við hesi ætlanini um at bjarga Smyril Line.

Samstundis harmar tað hana, at flutningsfeløgini, sum eru í Føroyum, ikki hava fingið høvið til at bjóða upp á dekspláss umborð á Norrønu til farmaflutning ímillum Danmark og Føroyar.

- Tað varð ikki bjóðað úr alment, tí tað tilboðið fekk bara eitt danskt felag, sum Smyril frammanundan samstarvar við, leggur hon afturat.

## Løgið at bankar ikki fíggja Norrønu

Eru framtíðarútlitini hjá Smyril Line so bjørt, mátti tað ikki verið neyðugt at fari til landskassan at biðja um pening.

Tað eru bæði Joel undir Leitinum, stjóri á Samskipum og Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship, samd um.

Sjálv sigur leiðslan í Smyril Line, at eftir fíggjarligu innspræningina og umleggingar í ferðaætlan og øðrum tillagingum, er framtíðin hjá trygg.

- Hví ber tað so ikki til at fáa privatar fíggingarstovnar at fíggja verkætlanina, spyr Joel undir Leitinum.

Somuleiðis undrar at Jóhonna á Bergi, at tað bara er landskassin, sum er sinnaður at fíggja framtíðina hjá Smyril Line.

- Tað er alment kent, at ein góð verkætlan fær altíð fígging og tí er tað undarligt, at tað skal vera landið, sum noyðist at fíggja Smyril Line. Var talan um eina burðardygga ætlan, mátti tað yvirið fleiri privatir fíggingarstovnar, sum høvdu áhuga í at fíggja, sigur hon.